## Viðgekk drápsætlan

Annar av monnunum, sum sambært amerikonsku løgregluni høvdu ætlanir um yvirgang í Danmark, hevur viðgingið, at hann ætlaði sær eisini at beina fyri mentanarblaðstjóranum á Jyllanda-Postinum, Flemming Rose, og teknaranum Kurt Westergaard, sum teknaði tær umrøddu Muhammedsteknˑingarnar. Undir avhoyringunum hevur David Hedley sagt, at hann hevði mælt sínum felaga til at sleppa ætlanini um at søkja at Jyllands-postinum, og at teir heldur skuldu beina fyri Flemming Rose og Kurt Westergaard.



## Strangari yvirgangslóg

Aftan á tær báðar handtøkurnar í USA vilja fleiri danskir politikarar hava eina frágreiðing frá fregnartænastuni PET fyri at fáa greiði á, um tað er neyðugt at endurskoða yvirgangslógina. Í Danska Fólkaflokkinum halda tey, at tað er neyðugt at kanna, um lógin skal gerast strangari. Sosialdemokratarnir og Vinstri taka undir við at endurskoða lógina, og at løgreglan eigur at fáa betri arbeiðskor, um tað er neyðugt. Hinvegin halda teir báðir flokkarnir, at handtøkurnar bera boð um, at verandi skipan er góð og virkar eftir ætlan.




*Ein fegin Julia Joensen, sum vann málning, ið Eivindur Mohr hevur málað*

# Julia gjørdist hepni vinnari

**Julia Joensen í Nólsoy gjørdist tann hepni vinnarin av kalendaravinninginum hjá Javna fyri september, sum er ein málningur, ið Eivindur Mohr hevur málað**

VINNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hvønn mánaða verður drigið um vinningarnar í álmanakkanum hjá Javna, men fleiri vinningar verða ongantíð heintaðir – helst tí, at fólk gloyma ella ikki vita, at álmanakkin eisini er ein lutaseðil.

Men fyrradagin ringdi ein fegin Julia Joensen úr Nólsoy, tí hon hevði vunnið, og í gjár kom hon inn á gólvið hjá Javna eftir vinninginum.

Seinastu trý árini hevur Javni selt álmanakkar við ymiskum evnum, og Javnaálmanakkin 2010 er gjørdur sum ein familjukalendari, tann fyrsti av sínum slag á føroyskum.

Familjukalendarin er gjørdur soleiðis, at upp til 5 fólk kunnu skriva avtalur og annað at minnast til, og er hann soleiðis ein hent hjálp í familjuni.

Sølan av familjukalendaranum byrjar leygardagin 31. oktober, sum er høvuðssøludagur. Tá ætlar Javni at náa so nógvum húskjum kring landið sum gjørligt. Sølan heldur síðan fram, til øll húski í Føroyum hava fingið vitjan av Javna.

Kostnaðurin fyri kalendaran er 100 krónur.

# Løgreglan kannar bilar

**Í vikuni hevur løgreglan gjørt grein 13-kanningar ymsastaðni í landinum, og ætlanin er at røkka um alt landið, sum hendan vikan og næsta vika ganga**

GREIN 13
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




Løgreglan er nú farin undir at kanna bilar kring alt landið, og fyrstu átøkini hava longu verið í hesi vikuni.

Hetta eru sonevndar grein 13-kanningar.

Mánadagin kannaði løgreglan tilsamans 228 bilar á fýra ymiskum støðum í Suðuroy.

38 frágreiðingar vórðu skrivaðar, harav tær flestu vóru fyri vantandi trygdarbelti, vantandi koyrikort, ymiskar lyktafeilir og niðurslitin ella skeiv dekk.

Aftrat hesum gav løgreglan í kanningunum í Suðuroy 29 átalur fyri ymisk smærri brek.

### Eisini í Havn

Um middagsleitið týsdagin kannaði løgreglan eisini bilar á Vegnum Langa í Havn.

Tilsamans 83 bilar vórðu kannaðir, harav 13 frágreiðingar vórðu skrivaðar fyri eitt nú lyktafeilir, vantandi koyrikort og slitin dekk.

Aftrat teimum 13 frágreiðingunum, gav løgreglan 7 bilførarum átalur.

Í hvørjum einstøkum føri, har frágreiðing verður skrivað, verða bøtur givnar, og minsta bótin eftir broytingunum í ferðslulógini er 500 krónur.

Løgreglan sigur, at átøkini, sum nú eru sett í verk, ætlandi verða um alt landið í hesi vikuni og í næstu viku.

### Aðrar kanningar

Løgreglan hevur eisini gjørt aðrar kanningar kring landið enn tær her nevndu, og í gjár vórðu eisini bilar steðgaðir í Eysturoy.

Í dag hevur løgreglan eisini verið at sæð á vegunum

# Jenny ynskir framhald

LEIKLIST
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fyrsta februar komandi ár eru fimm ár liðin, síðan Jenny Petersen gjørdist stjóri í Tjóðpalli Føroya.

Stjórastarvið er áramálssett til fimm ár, og tað merkir, at starvið sambært lóg skal lýsast leyst fimmta hvørt ár.

Tað er Leiklistaráðið, sum er setanarmyndugleiki, og nú starvið er lýst leyst at søkja, hava vit spurt Jenny Petersen, um hon ætlar sær at søkja um stjórastarvið í eitt fimmáraskeið aftrat.

Jenny sigur, at hon hevur trivist sera væl sum stjóri í Tjóðpalli Føroya, og henni dámar hesa avbjóðing so væl, at hon hevur einki ímóti at taka eitt fimmáraskeið aftrat.

- Nú hetta skeiðið hjá mær verður úti 1. februar komandi ár, ætli eg mær at søkja um starvið eitt fimmáraskeið aftrat, sigur Jenny Petersen, stjóri í Tjóðpalli Føroya.

Øll kunnu søkja um stjórastarvið í Tjóðpalli Føroya, men stendur tað upp til Jenny Petersen, heldur hon fram í starvinum eftir 1. februar komandi ár.



*Stendur tað upp til Jenny Petersen, stjóra í Tjóðpalli Føroya, heldur hon fram í starvinum eftir 1. februar 2010*